# Julehilsen til Grønland 2008

TÍÐINDASKRIV

Som noget nyt vil vi i år sende »Julehilsen til Grønland fra Færøerne«. Det er første gang vi sender hilsner til Grønland igennem Grønlands Radio med hjælp fra Kringvarp Føroyar.

Det giver herboende Grønlændere og andre med interesse for Grønland og deres familier, mulighed for at sende en hilsen til deres slægtninge, venner og bekendte på Grønland.

Julehilsen til Grønland bliver optaget lørdag den 15. november kl. 14.00 i Grønlænderhuset, Jøkulstræti 6, Tórshavn.

Tilmelding på telefon 314087, email: skp@olivant.fo eller på foreningens hjemmeside www.123hjemmeside.dk/skp

**Vel mødt.**
**Bestyrelsen**



## †

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Kadu Heinesen** fer av Heiminum við Vallalíð fríggjadagin kl. 11.30 norður í kirkjuna í Tjørnuvík. Jarðarferðin verður fríggjadagin kl. 14.00. Sungið verður úr sálmabókini. Tey, ið vilja minnast Kadu kunnu lata Heiminum við Vallalíð eina peningagávu konta í peningastovninum.

**Hergeir Poulsen**, ættaður úr Havn, andaðist í heiminum mikudagin 5. november, 72 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Kirkjugarðskapellinum mánadagin 10. nov. kl. 13. Sungið verður sálmabókini.

**Jógvan Godtfred Nielsen** andaðist í gjár 71 ára gamal.

---

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at okkara kæri sonur, pápi, beiggi, verpápi, abbi og langabbi

**Hergeir Poulsen**

andaðist í heiminum mikumorgunin 5. november, 72 ára gamal.
Jarðarferðin verður úr Kirkjugarðskapellinum mánadagin 10. november kl. 13.00.
Sungið verður úr sálmabókini.

*Vegna tey avvarðandi*
**Hanna, Heri, Rita og Rúna**

---

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at okkara kæri maður, pápi og abbi

**Jógvan G. Nielsen**

andaðist 4. november, 71 ára gamal.
Kistan fer úr Landssjúkrahúskappellinum leygardagin 8. november kl. 17.00
Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju sunnudagin 9. november kl. 14.00.

*Familjunnar vegna*
**Sonja, Terji og Elsa**

---

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæri maður mín, pápi, verpápi, abbi og langabbi okkara

**John Joensen**
ættaður úr Gerðum, Klaksvík

andaðist á Landssjúkrahúsinum 5. november 2008, 85 ára gamal.
Kistan fer frá kapellinum á Landssjúkrahúsinum sunnudagin 9. november kl.17.00 heim í Ebenezer.
Jarðarferðin verður úr Ebenezer mánadagin 10. november kl. 13.00.

**Daisy, Joan, Viggo og May við familju**

Tey, ið vilja minnast John, kunnu senda eina gávu til Akurin, konta í peningastovnunum.

---

# Takk



Hjartaliga takki eg tykkum, sum gjørdu mær 90 ára føðingardagin 4. august so hugnaligan.
Øll tit, sum frá nær og fjar í Føroyum og uttanlands heiðraðu meg við at koma til føðingardagshaldið og á annan hátt minnast til mín, fylla mítt hjarta í takksemi.
Takk fyri talur og sang.
Gud signi tykkum øll.

**Elin Maria Jørgensen, Miðvágur**

---

# Tøkk

Hjartaliga takk fyri sýnda samkenslu, tá ið okkara kæri

**Sivert Eliasen**
Fuglafjørður

andaðist og varð jarðaður.
Takk fyri blómur, kransar og gávur til Vesturstovu, og takk til tykkum mongu, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Bernhardina**

---

# Tøkk

Øllum tykkum, sum við blómum, gávum, uppringingum og á annan hátt gleddu meg á 85 ára føðingardegnum 27. september 2008, takki eg hjartaliga.

**Bestu heilsanir.**
**Kristian Olsen, Porkeri**

---

Dagurin

7. november. Engelbrekt. Deyður í 1225. Týskur munkur, sum longu 30 ára gamal gjørdist erkabiskupur í Köln. Sum kirkjupolitikari tók hann sær fyri at bøta um mong viðurskifti, sum vóru farin av lagi. Hann fekk, sum vera man, nógvar fíggindar, sum gingu saman í ráð og myrdu hann. Navnið er týskt, samansett av orðunum anglar (fólkaslagnum) og bjartur.

8. november. Claudius, deyður umleið ár 300. Steinhøggari, sum saman við fýra øðrum steinhøggarum altíð risti kross í tey arbeiði, hann legði úr hondum. Tá ið hann og felagar hansara noktaðu fyri at høgga myndir av skurðgudum, læt keisarin Diocletianus teir taka av døgum.

9. november. Teodor, deyður umleið ár 300. Ungur rómverskur hermaður, sum var vorðin kristin. Hóast tær atsóknir Diocletianus gjørdi at teimum kristnu, helt hann fast við trúnna. Hann setti eld á eitt skurðgudatempul í Róm og varð tikin av døgum. Grikst navn, ið merkir Guðs gáva.

Lesið
Sosialin